VIÐMERKINGAR

# Hurrá fyri skuldarreyvum landskassans

**Petur Martin Petersen**
*Grenaa*

Havi lisið uppskot frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Ikki eiti á hvat hesum maðurin kann.

At geva flest fólkum í Føroyum ta vón, at skyldar tú tí almenna pengar, so spælir hann jólamaður. Skriva eina umsókn til jólamannin, og eg fyrigevi tær.

Hevur jólamaðurin hugsa um, at nógvir av hesum persónunum liva í besta velgående, men við konu og børnum, id eiga alt sum ein myndugleiki kann trevja seg fram til.

Hevur jólamaðurin hugsa um, at hann her gevur teimum ið skylda almennan pening, ein blanco check at nýta almennan pening, fyri síðani at skriva eina umsókn til jólamannin um at tíverri tað gekk ikki. Bankin hevur fingið sítt, men jólamaðurin fær einki.

Mær vitandi eru tað hópatal av teimum, sum hava almenna skuld før fyri at gjalda landskassanum millumverandi aftur. Men um onki verður gjørt fyri at fáa peningin, jamen so lat standa til, tí einaferð kemur jólamaðurin.

Havi verið í starvi í 18 ár sum innkrevjari av almennari skuld. Havi verið úti fyri bæði einum og øðrum, men tað sum jólamaðurin nú borðreiður við, er tað fúlasta eg havi upplivað.

# HIV-smittað kvinna til Føroyar at siga frá um sjúku sína

**Tíðindaskriv**

Føroyar fáa í døgunum kring altjóða AIDS-dagin vitjan av eini HIV-positivari danskari kvinnu, ið fer at siga frá um seg sjálva og avleiðingarnar av at vera smittað við HIV.

Serliga hóskandi er tað, at ein kvinna fær høvi til at siga frá um AIDS/HIV, av tí at dagurin samstundis av alheimsheilsustovninum WHO er lýstir við evninum Kvinnur og AIDS.

Sjálvan altjóða AIDS-dagin – hin 1. desember – verður hon eftir døgurða at hoyra í auluni á Lærara-skúlanum. Áhoyrararnir her fara millum annað at vera lærara- og námsfrøðingalesandi skúlans umframt handilsskúlanæmingar í Tórshavn.

»Eg haldi tað vera sera týdningarmikið, at onkur trínur fram til tess at gera tað minni duldarfult, hetta at vera smittað við HIV. Og so hevði tað jú eisini verið frálíkt, um eg kundi gjørt mítt til, at fleiri ansa eftir sær sjálvum og sleppa undan at vera smittað«, sigur Brit Mølberg Nielsen. Í 1992 vóru hon og drongur hennara staðfest HIV-positiv. Brit veit, at hon er smittað við hinskyndum sambandi, men ikki, hvør ið smittaði hana. Rættiliga skjótt tók hon avgerð um ikki at brúka orku at fáa greiðu á hesum.

Hóast Brit hevur havt smittuna staðfesta í meira enn 12 ár, so hevur hon tað framvegis í dag gott kropsliga. Hon fær tað serligu samansettu viðgerðina fyri HIV-positiv og hevur bert fá hjáárin. Brit hevur millum annað yvirskot til at røkja sítt arbeiði sum sosialnámsfrøðingur á einum stovni fyri sálarsjúk. Hon býr í Keypmannhavn saman við samlíva sínum, sum hon eisini hevur hitt í HIV-umhvørvinum.

Parið hevur tó eingi børn, tí tey hevur Brit orsakað av sjúku síni tilvitað valt frá.

Á vitjan síni í Føroyum fer Brit at siga frá um hvussu tað er at liva við HIV. Her uppií tey trupulu tíðarskeið, ið hon hevur verið ígjøgnum, tá hon fekk staðfest sjúkuna. Umframt hetta fer Brit millum annað eisini at siga frá um, hvussu hon hevur tað í dag og hvussu fólk vanliga reagera, tá ið tey gerast greið yvir, at tey eru saman við einum menniskja, ið er HIV-positivt. Áhoyrararnir fáa harumframt møguleika at seta fram spurningar.

Umframt Brit verður eisini høvi at hoyra rithøvundan Jóanes Nielsen. Hann fer at lesa egnu stuttsøgu sína »Hin smædni hítakeyparin«.

Tað er ein bólkur av sjúkrarøktarfrøðingum undir felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, ið hevur tikið stig til upplýsingarvitjan Brit Møberg Nielsens í Føroyum. Bólkurin, ið nevnist Fá2, arbeiðir serliga við menning av krabba- og AIDS-økinum. Millum stigtakararnar er Anna Jóannesardóttir, sjúkrarøktarfrøðingur.

»Í bólki okkara við serøkinum krabbamein og AIDS gjørdust vit samd um, at vit vildu gera nakað burtur úr altjóða AIDS-degnum hin 1. desember. Vit vendu okkum tí til danska AIDS-grunnin, sum setti okkum í samband við Brit Mølberg Nielsen. Hon játtaði at koma til Føroyar at siga frá um seg sjálva. Vit halda tað vera beint at velja hana, tí hon er ein vanlig kvinna – ein eins og vit onnur, sum vit øll kunnu samanbera okkum við« sigur Anna Jóannesardóttir, sum eisini upplýsir, at Fyribyrgingarráðið hevur givið tilsøgn um at stuðla tiltakinum fíggjarliga.

Annars ber til at fáa meira at vita um evnið á mailadressunum www.aidsfondet.dk ella www.unaids.org/en

# Føroya Banki steingir tríggjar deildir

**Frá 1. februar 2005 verða broytingar í deildarbygnaðinum hjá Føroya Banka. Tríggjar deildir verða útbygdar, á tveimum deildum verður avgreiðslutíðin avmarkað, og tríggjar deildir verða stongdar**

**Tíðindaskriv**
*Føroya Banki*



*Frá 1. februar komandi ár verða broytingar í deildarbygnaðinum hjá Føroya Banka settar í verk. Tær hava millum annað við sær, at tríggjar deildir steingja*

*Tilvildarlig mynd*

Nýggi deildarbygnaðurin hjá Føroya Banka, sum kemur í gildi tann 1. februar, hevur við sær, at tríggjar deildir bankans steingja. Tað er deildirnar á Flogvøllinum, á Skála og í Leirvík.

Í nýggja bygnaðinum hjá Føroya Banka fáa kundarnir tó betri atgongd til ráðgeving í nærumhvørvinum, men í summum førum heldur longri til nærmastu kassaavgreiðslu.

Framyvir verður rúm fyri munandi fleiri kundaráðgevum, meðan talið av avgreiðslustørvum minkar. Nýggju ráðgevingaruppgávurnar koma at verða røktar av verandi starvsliði, og bankin bjóðar starvsfólkunum eitt miðvíst útbúgvingartilboð, fyri at tey kunnu brynja seg best møguligt til nýggju avbjóðingarnar.

Deildirnar í Kollafirði, á Strondum og í Gøtu, sum higartil hava verið avgreiðsludeildir, verða útbygdar, og koma framyvir allar at hava opið fulla tíð, og at bjóða allar tænastur, ráðgeving, inn- og útlán, tryggingar, fíggjaríløgur við meira. Hinvegin verða deildirnar á Flogvøllinum, á Skála og í Leirvík sum sagt stongdar. Á deildunum á Eiði og í Hvalba verða avgreiðslutíðirnar styttar til 2 tímar um dagin, tríggjar dagar um vikuna.

Eftir broytingarnar fer bankin sostatt at hava færri deildir, men deildirnar verða størri, og hava meiri víðfevnt útboð.

### Færri deildir

Í nýggja bygnaðinum verða færri deildir - 20 í mun til verandi 23 deildirnar. Hinvegin koma meginpartur av deildunum nú at bjóða allar tænastur – 14 av 20 deildum – í mun til verandi bygnað, har bert 11 av 23 deildum bjóða allar tænastur, meðan restin fyri tað mesta bert bjóða kassaavgreiðslur. Í hjálagda korti, er nýggi deildarbygnaðurin avmyndaður.

Kundar okkara vilja hava meiri ráðgeving um m.a. útlán, tryggingar, fíggjaríløgur v.m. Bankin hevur tí tey seinnu árini økt um talið av starvsfólkum, ið veita ráðgevingartænastur, men verandi bygnaður hevur verið ein forðing, av tí at nógvu avgreiðsludeildir bankans hava bundið nógv fólk til kassaavgreiðslur, hóast eftirspurningurin eftir hesi tænastu er minkaður heili 60% seinastu 5 árini, orsakað av øktu møguleikunum at gjalda sjálvvirkandi á ein lættan og bíligan hátt.

## fuglameingin

fuglameingin fjarborin
frælsur flákrar,

fevnir í føgru findarløtu
fáfongdu foldarbú,

flýgur, og firnast foyur
fjøldina fjarri,

frá farnur, fornu fjallafjøld
fánandi fylgið fylkist
í fjarska,

framskygnið fatta
flogið fremur.

**Christian F. Djurhuus**

## Tíðindaskriv frá HUXA (Fólkafloksungdómur)

Nýggj nevnd vald.

Á aðalfundi tann 13. novembur 2004 bleiv nýggj nevnd vald.

Í nevndini er nú:
- Poul Laust Christiansen. Formaður.
- Hans Anfinnson Norðfoss. Kassameistari.
- Turid Christophersen. Næstformaður.
- Eli Thorsteinsson. Skrivari.
- Regin Weihe Dalsgaard. Nevndarlimur

Nevndin hevur sett sær fyri at hava tvey størri tiltøk. Tað fyrra tiltakið snýr seg um Miðnámsdepilin og tað seinra tiltakið snýr seg um liberalismu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til formannin á 521516.

**Tórshavn, tann 29. november 2004**